# góðar myndir







## Veitslumyndir

Borðmyndir av veitslugestum eru stuttligar at eiga, men tær eru ikki altíð líka stuttligar fyri tey, sum eru á myndunum.
• Tak myndir frá borðhaldinum, áðrenn maturin kemur á borið og tallerkarnir enn eru pyntaðir við serviettum og prýði og ikki sovsaðir inn
• Á myndum av pørum, skal parið sita tætt saman
• Fólk vita ofta ikki, hvat tey skulu gera við hendurnar, tá ið tey verða avmyndað. Bið tey til dømis um at skála ella at halda lættliga um hvønn annan
• Fá eygnasamband, so fólk vita av, at tey verða avmyndað
• Flyt borðpynt, sum møguliga órógvar




## Ferðamyndir

Klassiska ferðamyndin, sum vísir, at vit hava vitjað ymisk áhugaverd ferðamál, kann verða meira ella minni væleydnað
• Stilla persónin í forgrundina við ferðamálinum í bakgrundini. Stendur viðkomandi ov tætt við ferðamálið, sæst hann ella hon ikki
• Tann, tú avmyndar, skal víkja týðiliga frá møguligum øðrum fólkum á myndini
• Ansa eftir, at gosvatn, pelar, stengur og líknandi ikki knappliga ”stinga út” úr oyrunum ella høvdinum á persóninum, tú avmyndar

